


**Nr. 7** ***30. mars 2025*** **85. árg.**

# Sálmur 23, vers 5

Eg má viðganga, at eg altíð havi undrast á, hvat ið hetta pettið í Sálmi 23 merkti. Eg hugsaði „Tú salvar høvd mítt við olju“ (v. 5 V.D.), var myndatala og skuldi boða frá, at Gud varðveitti sálmaskaldið, so hann var sunnur og frískur. Eg visti ikki, at tað eisini hevði ein djypri týdning.

## Salvar høvd mítt við olju

„Seyður kann fáa høvdið vavt inn í viltvaksandi rósurunnar, og hann kann doyggja, tá ið hann roynir at sleppa leysur. Tað eru eisini andstyggiligar lítlar flugur, sum dáma at pína og plága seyðin við at verpa víggj (t.e. fluguegg) í nasagluggarnar á honum. Víggini verða til maðkar, og teir tvinga seyðin at berja høvur sítt móti einum kletti. Viðhvørt slær seyðurin seg til deyðis. Oyruni og eyguni verða eisini ávirkað av hesum flogkyktum, sum pína og plága. Hirðin salvar tí alt høvdið á teimum við olju. So er friður. Henda oljan verjir móti tí óndskapi, sum roynir at oyðileggja seyðin.

Eru tað tíðir í tínum lívi, har tú plágast av sálarligari pínu? Ørkymlandi tankar herja á teg aftur og aftur? Slært tú høvdið móti einum veggi fyri at royna at steðga teimum? Hevur tú nakrantíð biðið Gud salva teg við olju? Hann hevur óendaligar nøgdir! Hansara olja verjir og ger tað møguligt hjá tær at festa títt hjarta, tín hug og tíni eygu á Hann (Hirðan, Frelsaran) í dag og altíð! Tað er friður í dalinum! Má okkara góði, góði Faðir salva høvur títt við olju í dag, so at bikar títt flýtur yvir við signingum. Gud er góður, og Hann er trúfastur.

*Úr enskum. Effie Campbell* umsetti.

# Summmi spotta

Á missiónsvikuni greiddi ein maður frá, at hann plagdi at vitna fyri sínum arbeiðsfeløgum. Summi halda, at tað er at fara ov vítt; men Bíblian biður okkum vera brennandi í andanum (Róm. 12,11), og Jesus ávarar okkum og sigur, at um vit eru flógv, lunkað, so vil hann spýggja okkum út úr munni sínum. (Opb. 3,16).

Einaferð arbeiddu hann og ein annar saman. Hann segði okkurt um Jesus við mannin; men hesin flenti bara so hjartaliga. Hasum trúði hann einki uppá, segði hann. Men á Nóa døgum flentu fólk eisini, endin var kortini, at flóðin mikla kom, og tey druknaðu øll. Tá flentu tey helst ikki.

Hin maðurin arbeiddi í einari maskinu, meðan tann trúgvandi gekk frammanfyri og peikaði honum á steinarnar, ið hann skuldi taka. Trúgvandi maðurin var í gulum oljuklæðum og vendi bakið til hin. Jakkin hevði hettu, og niðan fyri hana hevði hann skrivað J L, so hann kendi sín arbeiðsjakka aftur, hetta vóru forbókstavirnir í navni hansara.

Brádliga bankar maðurin í maskinuna upp á rútin. Hin snarar sær á og fer yvir og letur hurðina upp á maskinuni. Har situr maðurin og er øskugráur í andlitinum. „Hvat bagir tær?“ spyr trúgvandi maðurin.

„Tað stóð við lýsandi bókstøvum eftir rygginum á tær: JESU LAMB,“ svarar hin.

„Ja, nú hevur tú ið hvussu er fingið prógv fyri, at Jesus livir, og nú er tað upp til tín, hvat ið tú gert við ta vitanina,“ svaraði tann trúgvandi maðurin.

„Sí, Guds lambið, sum ber synd heimsins.“ (Jesus ber burtur synd heimsins) Jóh. 1,29. Hann er ofraður fyri tínar syndir, hvat gert tú við tað?

*Effie Campbell*

# Hvat arbeiðir Gud við?

Gud sendi son sín til hesa verð, tí hann skuldi gjalda prísin fyri syndina. Tann prísurin var deyðin.

Jesus fullførdi tað arbeiðið við ósigandi pínu – men eisini við ómetaligari gleði. Tá ið hin krossfesti Guds sonur rópti: „Tað er fullgjørt!“ – var ein vegur ruddaður aftur til Guds fyri øll menniskju.

Hvat arbeiðir Gud við? **At øll menniskju skulu frelsast**. Men meginparturin hevur lítla virðing fyri Jesusi. Vit halda, at alt tað góða, vit hava í gerandisdegnum, hava vit sjálv framleitt – og taka æruna fyri tað. Hvussu mong munnu takka Gudi fyri dagliga breyðið, fyri heilsu, fyri evni og at sleppa at liva undir tryggum korum?

Hvussu nógv skulu vit missa? Hvussu nógv skulu vit verða pressað? Hvussu nógv skulu vit verða roynd, áðrenn vit sanna, at vit hava brúk fyri Jesusi???

Er ein korona-pandemi nóg mikið, áðrenn vit boyggja okkara knø fyri Jesusi Kristi og takka honum fyri ta undurfullu frelsu, hann hevur vunnið okkum?

Vit biðja um veking, um eitt gott heyst, um skarar, ið verða frelstir, áðrenn Jesus kemur aftur.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein undurfull hending

Ein gamal maður fortaldi uppi í K.F.U.K. frá einari hending, sær hevði verið fyri. Hendingin fór fram fyri árum síðani; men hon hevði havt slíka ávirkan á hann, at hann roknaði ikki við, at hann nakrantíð fór at gloyma hana. Hann hevði arbeitt 20 ár sum skrivstovumaður inni á Toftum í einum stórum handilsvirki. Tá á døgum bar ikki til at ljósprenta (fotokopiera). Staðin fyri høvdu tey eina duplikerings-maskinu. Tað gekk fyri seg á tann hátt, at tú skrivaði tað, tú ætlaði tær, á eitt serligt ark. Hetta arkið varð kallað ein stensilur. Síðani tókst tú stensilin og legði hann um eina rullu í maskinuni. Einastaðni var sverta, og í einari skuffu vóru nógv ørk. Síðani var bara at vinda, og út komu øll ørkini við somu tekst, sum stóð á stensilinum. Hesin maður gjørdi ofta fólki eina tænastu, tá ið brúdleyp ella føðingardagur var, at duplikera sangir fyri tey.

Eini hjún áttu eina hálvt ára gamla dóttur, sum var sjúk. Smágentan doyði. Eitt kvøldið bankaði uppá hjá hesum manni, og hann varð biðin um at duplikera tvey ørk við sangum til jarðarferðina hjá smágentuni. Jú, tað var gaman í. Hann tók so dóttur sína við sær, tí har vóru fleiri skrivimaskinur, so kundu tey skriva hvør sítt ark, so gekk skjótari.

Men fyrst noyddist hann at fara inn til ein mann at læna lykilin til virkið. Hesin maður kom við teimum oman, tí hann hevði gloymt okkurt eftir.

Tá ið maðurin var liðugur at skriva sítt ark, fór hann at duplikera. Hann stóð og vant og vant, og alt gekst væl í fyrstuni. Men pappír eru órein at klistra seg hvørt upp at øðrum, og áðrenn hann visti av, leyp ein stórur klumpur upp á eini 30 ørk út á gólv.

Hin maðurin, sum var komin við lyklinum, stóð beint framman fyri maskinuni. Hann peikaði bilsin niður á gólv og segði: „Hvat er hetta fyri nakað?“ Har lógu øll 30 ørkini hvørt oman á øðrum, og stakk hvørt teirra kanska 1 mm longur út enn arkið, sum lá uppiyvir. Á kantinum, sum øll hesi 30 ørkini gjørdu til samans, stóð klárt og týðiligt at lesa: „**Eg eri Jesu lítla lamb**.“ – Tey stóðu øll trý so bilsin har og kendu, at Gud hevði talað, tí hetta hevði eingin kláraða at gjørt, hvussu fegin hann so vildi. Víst stóð hetta versið mitt inni á blaðnum, men at fáa sett hesi orðini út á kantin á ørkunum, tað var ógjørligt. Tey skiltu hetta sum eini boð frá Gudi. Tey 30 ørkini eigur maðurin enn, hann hevur goymt tey øll hesi árini sum eitt dýrabart minni.

*Effie Campbell.*

# Tungan og svørðið

Ein kinesisk halgisøga sigur frá, at tungan og svørðið bæði vóru komin í fangahús saman.

„Hvat hevur tú gjørt?“ spurdi tungan.

„Á,“ svaraði svørðið, „eg havi úthelt nógv blóð!“

„Bara tað,“ svaraði tungan, „er tað nakað at koma í fangahús fyri? Eg havi logið, spottað, baktalað, bannað, spilt tað góða orðið og navnið hjá menniskjum, brotið friðin og dripið kærleikan!“

Ja, tungan er ein lítil limur, men kann gera stóran skaða. Lesið, hvat ið skrivað stendur um tunguna í Jákups brævi, kapittul 3. Boyggj hjarta títt fyri honum, sum skapaði teg, og bið um náði at fáa tungu tína halgaða, so hon kann breiða út signing.

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 30. mars | **Tekstur:** | Luk. 10,38-42 | **Bíbliuorð:** | Matt. 6,33 |
| 6. apríl | **Tekstur:** | Matt. 26,69-75 Jóh. 21,15-19 | **Bíbliuorð:** | Sl. 103,12 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 8** ***13. apríl 2025*** **85. árg.**



# Hvussu skilja vit Guds Orð?



Guds Orð verður ofta brúkt soleiðis, at tað, sum er satt fyri teg, ikki neyðturviliga er satt fyri meg. Vit avgera sjálv út frá okkara skili og lívsáskoðan, hvat ið er rætt, og vit velja gleðiliga tað frá, sum ikki hóvar okkum.

Tað er møguleiki fyri, at vit hevja okkum sjálv upp til at vera fasittið, úrslitið, og at vit snara og benda Guds Orð fyri at fáa tað at passa inn í egnar hugsanir. Vegleiðingin hjá kirkjuni verður veik og víkjandi, tí fatanin gongur í allar møguligar ættir. Um vegleiðingin frá kirkjuni verður ótýðilig, so skapar tað bara hurlivasa, split og ørkymlan. Har tvey kristin møtast, eru brádliga tríggjar meiningar.

„Um lúðurin gevur ógreidligt ljóð, hvør man tá búgva seg til bardaga?“ (1. Kor. 14,8). At savna hermenn um tað týdningarmikla og góða málið hjá kirkjuni dettur niðurfyri, tí fólk renna í allar møguligar ættir. Ein spjadd og ráðaleys kirkja missir trúvirði. Hví skulu vit lurta eftir henni? Hon veit jú ikki so frægt sum, hvat ið hon sjálv meinar. Tað verður høpisleyst, tí tað eru so nógvar ósamsvarandi meiningar, sum útjavna hvør aðra. Í 2.000 ár hevur kirkjan boðað „syndernes forladelse – ikke syndernes tilladelse“.

Einaferð segði Jesus við Pætur: „Hold og blóð hevur ikki opinberað tær tað, men faðir mín, sum er í himlunum.“ (Matt. 16,17).

Fyri at skilja Guds Orð er okkum tørvur á Guds Anda. Tað er avgjørt ein fyrimunur at bjóða honum inn í okkara lestur. Vit kunnu ikki týða Guds Orð sjálv óheft av honum. Hann er Hjálparin, sum vil vegleiða okkum til allan sannleikan. Uttan

hann eru vit „lost in space“, og hugsanirnar verða hareftir. Okkara hugsan, grundan og útlegging av Guds Orði verður sum illgras og villsprotar á akrinum, um vit ikki fáa hjálp frá Heilaga Andanum. Tá ið Heilagi Andin sleppur at vegleiða okkum í Orðinum verða fruktirnar: friður, rættvísi, rættur og frelsa. Kyrie Eleison.

*Frank Erlandsen, pastorur – Effie Campbell* umsetti.

# Eg vil út, eg vil út á tað brúsandi hav

Hesin sangurin varð brúktur í mong ár, áðrenn greiða fekst á, at skaldið var Anders Ålander.

Tað tykist, sum kom hann á prent fyrstu ferð í „Veckoposten“ í 1941, men eingin á blaðnum visti, hvør ið skrivað hevði.

Sangurin varð skrivaður í einari vekingartíð, og tá er tað ofta soleiðis, at boðskapurin hevur størri týdning enn boðberin.

Lapp-Lisa gjørdi sangin kendan. Vegna myndataluna er sangurin vorðin nógv brúktur millum útróðrarmenn, sjófólk og á fiskaplássum. Hann er eisini væl dámdur millum ungdóm, har tað ofta eru ótilgjørdir og glaðir sangir og tónar, sum fáa undirtøku.

Sangurin er eitt „jublandi ja“ til kall Jesusar: „Fylgið mær eftir, so vil eg gera tykkum til mannafiskarar!“ Matt. 4,19.

Hvat ið lagnum viðvíkur, haldi eg, at skaldið helst hevur gjørt tað við. Bæði tvey komu fram í senn. Seinni er lagið „Ger tað sindrið, tú kanst“, ofta brúkt.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eini boð frá Gudi

Ein gomul trúgvandi kona segði mær frá hesum: „Sonur mín las niðri á universitetinum. So skuldi hann koma heim til Føroya eitt skifti. Eg sendi honum pengar fyri ferðaseðilin.

Beint eftir hetta verði eg sterkt ámint um at senda honum 200 kr í einum brævbjálva. Eg skúgvaði hetta burtur frá mær, tí eg hevði júst sent honum pengar. Men eg fekk ikki frið fyri hesum, eg slapp ikki burtur úr hesum tonkunum, og tí gjørdi eg eftir hesi áminningini.

Nakrar dagar seinni kom sonurin heim. Hann gav sær ikki stundir at siga góðan dag, tá ið hann fetaði eftir køksgólvinum og fall um hálsin á mær og segði: „Sum tað var gott, mamma, at tú sendi mær hasar 200 krónurnar!“

Síðani greiddi hann frá, at hann hevði borið ymiskt út í tún, og úthurðin hevði staðið opin, men brádliga smekkar hon í, og har stendur hann og fekk ikki útvegað sær nakran lykil. So mátti hann fara til lásasmiðin, og tað kostaði 200 kr.

Ja, so gjølla fylgir Harrin við."

*Effie Campbell.*

# Eg vil út, eg vil út

***Lag:*** *„Ger tað sindrið, tú kanst."*

Eg vil út, eg vil út á tað brúsandi hav,
vinna sálir til Jesus mín kong.
Gleðiboðanar nót hana Harrin mær gav,
fyri stríð sítt hann fáa má fong.
Lat so aldurnar slá', við hans nót út eg má,
fáir menn royna havinum á.

Sjálvt um nótin er tóm, tá hon drigin er inn,
garnið kasti eg út aftur straks,
hvørja løtu eg nýti, eg standa má stinn
og ei óttast regn, vind ella baks.
Tann, sum ærligur er og í stríðið út fer,
hann fær fisk, so tí hugreystur ver.

Sum tað hendi í forðum, tað ljóðar enn hátt
til ein fiskara falnan í fátt:
„Út á djúpari sjógv, legg úr landi tú brátt,
set so nótina har til ein drátt."
Gert tú tað, eg teg bað, tú skalt síggja í dag,
full er nótin, so fá tað í lag.

Og tú, sum til einkis her stendur í dag
og bert lítur at øðrum, kom við.
Tú veitst jú, at tíðin ei stendur í stað,
og at Jesus er við tína lið.
Kom nú, fá tað í lag, og nú fiskin upp drag,
ja, set á, ja, set á nú í dag.

***Orð og lag:*** *Anders Ålander 1943.*
*Effie Campbell* týddi.

**Lester Sumrall**:

„Tað eru bara tey kristnu, sum lata sínar særdu soldátar liggja eftir á vígvøllinum. Ein og hvør siðiligur herur tekur sínar særdu soldátar heim við sær, so at tey fáa best møguligu viðgerðina.“

*e.c.* ums.

---

Eg havi lært, at hevndin skal latast upp í hendurnar á Gudi og er ikki fyri okkum menniskju.

*e.c.* ums.

---

Tá ið ein muslimur tekur ímóti Kristusi, verður hann forelskaður í Jesusi og Bíbliuni. Teir verða einfaldir og sannførir trúgvandi, sum ongar trupulleikar hava við øðrum kirkjusamfeløgum.

*e.c.* ums.

---

Muslimar søkja fyrigeving, og teir trúgva eisini, at bønirnar, teir biðja undir Ramadan, hava eina serliga kraft. Vit siga teimum, at tað er ein Gud, sum hoyrir bønir teirra alla tíðina, og at fyrigevingin er longu givin gjøgnum Jesus.

*e.c.* ums.

---

Áðrenn Jesus rópti Lázarus aftur til lívs, hugdi hann upp móti himli og segði: „... Faðir, eg takki tær, av tí at tú hevur hoyrt meg.“ Jóh. 11,41. Nakað undranarvert hendir, tá ið tú frammanundan takkar Gudi, at hann frelsir teg, verjir teg og hevur umsorgan fyri tær. Trúgvin lyftir seg upp, og tú fært dirvi at bjóða tí, sum tú fyrr helt, var deytt, aftur til lívs.

*e.c.* ums.

---



**SUNNUDAGSBLAÐIÐ**
***ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!***



---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13. apríl | **Tekstur:** | Matt. 26,33-35 + 69-75 | **Bíbliuorð:** | 5 Mós. 31,6c |
| 20. apríl | **Tekstur:** | ***Páskadagur:*** Jesu uppreisn, Matt. 28,1-15 | **Bíbliuorð:** | Matt. 28,6 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74